# FER EUROPA AT REISA SEG?

## Hugleiðingar um tað nýggja Europa, um týskt mál og týskar bókmentir og um meginlandsins leiklut yvir av heiminum og USA



**Dupultkronikk eftir Hanus Kamban**

Á okkara ferð suður ígjøgnum Týskland hugsi eg av og á um mín gamla lærara Christian Haraldsen, elduvíkingin, sum leiddi meg og mong í mínum ættarliði okkara fyrstu stetlandi fet inn í málið hjá Goethe og Thomas Mann. Eg síggi hann fyri mær, høgur maður, eitt sindur bogin, andlit og nøs langlig, eygnabráið góðsligt. Onkuntíð kundi hann siga nakað soleiðis: "Og nú, góðu børn, leggja við bøkurnar til viks, og so skulu vit práta". Hann hevði nú leiklutin sum orðstýrari, meðan vit sluppu at siga okkara hugsan um mentan, politik ella bókmentir, burturi sum heima. Ofta endaði hetta við, at lærarin tók orðið og fór at fortelja okkum um Goethe, Schiller ella Heine, um Faust og Mariu Stuart, um Martin Luther ella *Das Nibelungenlied.*

Nær, hugsi eg við mær sjálvum, mundi tað vera, ein varnaðist, at okkurt serligt var við hesum málinum, har gandur æt *Zauber*, og andi æt Geist, og sús æt *Rausch*? Var tað tá ið Haraldsen fyrstu ferð lærdi okkum at syngja *Am Brunnen vor dem Tore*? Ella var tað kanska uppi undir væðingini í Gamla Klubba, har vit hildu jólaveitslu seinast í fimtiárunum og sungu *O Tannenbaum, O Tannenbaum, wie treu sind deine Blätter,* meðan vit hugdu at gentunum hinumegin borðið, sum vit sóu, summar næstan í Lorelei-glæmu, við droymandi eygum, umsveiptir av anganum av granngreinum og blaktrandi kertiljósum?

Kanska var tað tó ikki av álvara, fyrr enn útvarpið var komið, og vit lærdu slagaran *Seemann*, sum vit seinni dansaðu til í ólukkumáta, úti sum heima:

*Deine Liebe ist den Schiff,*
*Deine Sehnsucht ist die Ferne*
*Über Bali und Hawai*
*Über Rio und Shanghai ...*

Nú eri eg ikki sjómaður, og mín longsul stendur hvørki til Bali ella Rio, og kortini havi eg, eins og hetjan í hesi vísu, givið eftir fyri eini útferðarlangtan, við uppruna og skapi, sum kanska ikki gerast týðulig, fyrr enn henda kronikk er at enda komin. Úrslitið av hesum er, at eg og mín fylgisneyti mánakvøldið tann 19. juli 2004 stíga úr flogfarinum á Schönefeld flogvølli, at vit í tríggjar dagar dvølja í Berlin, at vit tær komandi tríggjar vikurnar fáa høvi til at ferðast gjøgnum Mið- og Suðurtýskland, eystarumegin, og gjøgnum ein part av Eysturríki, og at vit heimafturkomin hava stigið ikki heilt fá spor í m.a. Berlin, Dresden, Weimar, Regensburg, Passau og Wien.

Hvat er tað so, sum stendur týðiligast í huganum eftir ein tríggja daga steðg í Berlin? Dómkirkjan í høvuðsstaðnum, Berliner Dom, tað jødiska savnið, Marienkirche, har *Der Totentanz* er evnið í einum longum kálkmálningi í einum hválvi í forkirkjuni, deyðans hjávera millum tey livandi, avmyndað á miðaldarligan og samstundis merkiliga modernaðan hátt - alt hetta hugtók.

Og mannfjøldin á Berlin Alexanderplatz, og í Prenzlauer Berg, litaðar lyktir millum grønar runnar í skýmingini, ikki ólíkar fuchsiuni, sum nú sprettur í okkara urtagarði, ývin við reyðum og reyðviolettum klokkum, borð eftir borð uttanfyri hoknandi undir vín- og ølgløsum, eitt yðjandi, tysjandi lív, sjóðan og sangur kring borðini, leysafríggj millum trøini, eitt endaleyst rað av mat- og ølstovum við ómetaliga longum innanduraskálum, gentur, tær flestu í trongum, svørtum blusum og buksum, sum fáa tað hvíta holdið at skyggja bleikt, standmyndarkent og hættisligt, alt tekin um lív og forfall, treysti til framtíðina og listarligt sprækni her á mótinum millum tað farna DDR og tað farna Vesturtýskland, kanska sum eitt kreativt úrslit av savningini, sum tók seg upp frá 1989.



*Christian Haraldsen undirvísti í týskum og fronskum á studentaskúlanum 1937-74*

Men tað, sum kortini stendur klárast í huganum aftaná, við farra av njóting og vælveru, ið liggur leingi á, er eitt pláss ikki langt frá Kurfürstendamm, Savignyplatz eitur tað, inn í plássið føra, sum snældur í einum rokki, sjey gøtur, í hjartanum sjálvum er plantað ein lítil lund, og eisini í sjálvum útjaðaranum vaksa trø, og her eru eisini matstovur og kaffistovur.

Yvir hesum bletti í tí annars mangan skundmikla og rokuta Berlin er ein kensla af friði og næstan parisiskum lættleika, ein kensla, sum fær dýpd og ríkidømi, tá ein varnast, at á tveimum ymiskum støðum eru bókhandlar, sunnanfyri Der Bücherbogen, við ómetaliga stórum úrvali av bókmentum um list, listaástøði og listasøgu, og í ein útnyrðing, nøkur fet inni í Carmerstraße, *Die Autorenbuchhandlung,* ið er væl minni, men hevur framúr gott úrval av føgrum bókmentum og verkum um bókmentasøgu, umframt at har eru vitandi og fyrikomandi starvsfólk.

Eg leiti mær yvir á Savignyplatz ein fyrrapart, sessist uttan fyri eina av kaffistovunum við einum café latte og kenni meg kíndan av morgunlotinum og frískaðan upp av tí súrevni, sum rekur úr grønskuni yvir mær og rundan um meg, meðan eg samstundis eri vitandi um, at ikki langt burturi halda Thomas Mann og Paul Celan til, í ymiskum og spennandi hamum, útgávum og viðgerðum.

Men sjálvsagt ber til at rúgva á eldri plinkar. Vit síggja í bløðunum, at eitt kvøldið er Schiller-upplestur í Berliner Dom, vit fara avstað við smogujarnbreytini, tað lukkast okkum at koma fram rættstundis inn í ein sal høgrumegin stutt frá høvuðsdurunum. Ein sjónleikarkvinna, sum man vera um tey sjeyti, lesur upp yrkingar eftir skaldið, eitt nú *Der Taucher, Die Bürgschaft* og *An die Freude*, hon lesur livandi og so týðiliga, at hvørt orð hoyrist og myndin stendur klár fyri okkum:

*Es kommen, es kommen die*
*Wasser all,*
*Sie rauschen herauf, sie rauschen*
*nieder,*
*Den Jüngling bringt keines*
*wieder.*

Eftir upplesturin verða vit áhoyrarar bidnir um at koma upp ígjøgnum einar trappur, og haruppi, í einum heldur minni sali, fáa vit, standandi við smá rund borð, hvítvín, reyðvín ella bara djús og eina breyðflís. Tað eydnast okkum at koma á tal við upplesaran og mannin hjá henni, sum er amerikanari og hevur skrivað doktararitgerð um Carl Th. Dreyer.

Vit hitta eisini tríggjar eldri konur, sum, tá ið eg spyrji, hvat tær gera, svara: *Wir sind Rentner.* Tað vísir seg, at tær eru einkjur, úr tí gamla DDR, sum brúka tað sum eftir er av lívinum til at sløkkja sín tosta eftir mentan, og sum sostatt umboða eina av dygdunum í hesum farna samfelag, ta hugsan, at mentan er hvørs mans ogn, og at Schiller og Heine væl kunnu kappast við *Dire Straits* ella *Tom Jones.*

Tað er tann 21. juli, vit hitta hesar kvinnur (ein teirra æt Irmgard, ein onnur Ilse, navnið á tí triðju minnist eg ikki), og nettupp um hetta mundið eru serliga tveir søguligir persónar frammi á europeiskum blaðteigum. Annar er Francesco Petrarca, sum varð føddur seinast í juli 1304 og sostatt heldur sín 700 ára dag, nú vit koma til Berlin, skald, ferðamaður, bókasavnari og mikil kvinnuyndari, sum orðini voluptas oculorum - eygnanna girnd - úr einari av hansara sonettum bera boð um. Týskarar, kann eg leggja aftrat, fagna hansara føðingardegi við stórfingnari bókaútgávu.

Hin er Claus Philip Schenk von Stauffenberg, heryvirmaður og høvuðsmaður í kvettroyndini móti Hitler tann 20. juli 1944, skotin sama kvøldið. Sjónleikarkvinnan, sum so væl tolkaði Schiller fyri okkum, nevndi til seinast von Stauffenberg, hann var ikki nógv virdur, heldur ikki í Adenauer-tíðini, men, leggur hon dent á, hann var ein sonn hetja, ein idealistur, sum gav lívið fyri frælsi og rættleika, ein, sum Schiller hevði kent sum sín andiliga frænda. Nei, hugsar ein við sær sjálvum, javnaðarmaðurin Willy Brandt var heldur ikki nógv umhildin í Adenauer-tíðini, men tað eru slíkir - ein von Stauffenberg, ein Brandt, ein Celan - sum standa faddrar at tí nýggja Týsklandi og tí nýggja Europa.

Dagin eftir leita vit út til Schönefeld Flughafen, á skrivstovuni hjá Hertz verða skjøl í hópatali undirskrivað, nakað seinni sessast vit í einum silvurgráum, spræknum og vælfjaðraðum Peugeot 307, sum ber okkum suðureftir eftir breiðum motorvegum, har skillig tekn eru at ýta av eftir. Okkara fyrsta mál er Dresden, vit finna okkara vallaraheim í Louisenstraße í Neustadt, og um níggjutíðina um kvøldið kunnu vit eta nátturða á tí griksku matstovuna Plaka á horninum Louisenstraße-Alaunerstraße.

Vindeyguni standa opin, úr garðinum yvirav lýsa litaðar lyktir millum trøini, uttanfyri er ein faran og tysjan av ungdómi, við taskum, við súkklum, prátandi leiðandi, hetta eru Sakslands børn, glað, løtt í huga, sinnilig.

Morgunin eftir fara vit at hyggja at býnum, og tann sjón vit síggja, tá vit koma til endan á tí breiðu Hauptstraße er, við sínum bergtakandi vakurleika, heilt óvæntað: Har eru tær tríggjar brúgvarnar, tann mittasta við rundbogaðum hválvum undir takinum, undir teimum streymar Elben breið og stríð, á tí breiða at kalla slætta áarbakkanum síggjast fólk, sum lesa, eta ella bara hvíla seg, í ánni vassa børn og eftir henni sigla prámar og skip, hetta er ein sjón, sum kundi hugtaka ein málara sum Canaletto (hin yngra), sum hegnisliga, við gløggum eyga fyri øllum staklutum, hevur megnað at endurgeva hennara tíðleysu friðsælu og miðaldardæmdu sjarmu.

Dresden varð sum kunnugt bumbaður, púra óneyðugt, tann 13. og 14. februar 1945, av Teimum Sameindu. Álopið sorlaði ein stóran part av tí gamla býnum og mangar stórfingnar bygningar og drap ein hóp av sivilfólki. Í tí uppafturbygdu Hofkirche, sum í stíli er dømi um hábarokk, sæst, í forkirkjuni, ein modernað Pietà, sum er sjáldsom, tí hon bindur saman átrúna og søgu, í hesum føri ta nýggjastu søguna, og tankin tykist vera - í samsvari við hugsanina hjá Serenus Zeitblom seinast í skaldsøguni *Doktor Faustus* eftir Thomas Mann - at eitt fólk, ið sjálvboðið gongur undir Saurons vald, má gjalda fyri hetta, og at gjaldið eisini rakar tey óseku og enntá rættvísu.



*Í listaskálanum í borgini Zwinger hongur Tann sixtinska Madonnan eftir Rafael*

Hetta rennur mær í huga nakrar dagar seinni, tá vit í Weimar eitt kvøldið hoyra upplestur av Goethe-pastisjum og Goethe-parodium, og upplesarin til seinast lesur eina gitna kabarettyrking eftir Erich Kästner (sum var føddur í Dresden):

*Kennst Du das Land, wo die*
*Kanonen blühn?*
*Du kennst es nicht? Du wirst es*
*kennenlernen!*
*Dort stehn die Prokuristen stolz*
*und kühn*
*in den Büros, als wären es*
*Kasernen.*

Kästner er beiskur, og ikki minni beiskur og harmur var Hjalmar Söderberg, sum ikki var at undrast á, hann ferðaðist nógv í Týsklandi, týskarar vóru teir fyrstu uttan fyri Svøríki, sum góvu hansara skaldskapi ans og týddu hann, og tað var í München, í 1910, seinna kona hansara Emilie Voss átti dóttrina Betty (móðir Henrik Stangerup). Tá ið hetta mentaða land gav seg inn undir psýkopatin úr Linz, tók tað Hjalmari dygt, og hann helt, at verri vanlukka hevði ikki rakt Europa í 20. øld. Hann doyði í oktober 1941 og upplivdi sostatt tíverri ikki at síggja týskin steðgaðan stutt frá Moskva, tað fyrsta teknið um ósigurin í 1945.

Í dag blóma ongar kanónir í Týsklandi, men her tykist alt annað at blomstra, mentan, tónleikur, blaðútgáva, list, fyrimyndarliga er fyriskipað í býum og á landavegum, fólkið er blítt og fyrikomandi, og sorlaðir býir eru uppafturbygdir. Og hetta tykist at vera eitt av aldarinnar undrum, at eitt land og eitt fólk, sum í 1945 lá í skeljasori, hungrað inn at beini og moralskt, at vísa seg, óbøtiliga fallið, nú tykist at hava rist myrkrið uttan av sær, gloymt (um kanska ikki til fulnar gjørt upp við) brotsmenn og fívlar, og fingið í aftur slóðina eftir Kant, Goethe og Heine.

Tankarnir reika út um Týskland, og einum lystir at draga Europa og USA inn í myndina. Frá 1945 høvdu vit í heiminum tveir høvuðspólar, USA og Sovjetsamveldið, í 1989 fall og syndraðist tað sovjetska ríkið, og síðani hava vit livað undir *pax americana*, undir skugganum ella (vildi onkur sagt) ljósinum frá einum stórveldi.

Men hvør sigur, at henda støða verður varandi, og at ikki nýggj paradigmu kunnu taka seg upp? Semja er ikki um hesi mál, og spádómar og metingar eru ógvuliga ymisk. Á okkara ferð suðureftir fái eg fatur á eini bók eftir franska søgufrøðingin og demografin Emmanuel Todd, bókin hevur upprunaheitið *Après l´empire. Essai sur la décomposition du système américain.*



*Claus Schenk von Stauffenberg stóð á odda fyri kvettroyndini í 1944*

USA, sigur Todd, førdi í ein mansaldur ein (møguliga og lutvís) ábyrgdarfullan politikk, røkti sín egna búskap væl og stuðlaði Europa við Marshall-hjálpini.

Men eftir múrsins fall bleiv freistingin ov stór, og síðani hevur USA, við merkiliga lítlum framskygni, yvirspælt sín leiklut. Við tað at landið ikki longur er eitt fólkaræði, men eitt oligarki (fámannaveldi), megnar tað ikki at halda ta sokallaðu Doyles Lóg, sum sigur, at kríggj millum fólkaræðir er óhugsandi.

Er tað ikki tankavekjandi, at heimsins sterkasta land, í teirri løtu, tá ein verulig vón um heimsfrið vísir seg, leggur vertin á umhvørvið, setir ferð á hernaðarliga dubbing og noktar at viðurkenna tann nýggja altjóða kriminaldómstól, ið kann ringja inn eina nýggja etiska heimsskipan? Orsøkin til hesa støðu er, sambært Todd, at politikkurin hjá USA sprettur, ikki úr styrki, men úr veikleika, úr teirri sannroynd, at landið er politiskt sera veikt og búskaparliga í eini ógvuliga hættisligari støðu, við tað at landsins peningaliga styrki, orsakað av stórari og vaksandi skuld, stendur og fellur við innflutningi av fremmandum gjaldoyra, einum innflutningi, sum kann minka ella steðga í somu løtu, evran sum gjaldoyra vinnur á dollaranum.

(framhald)



*Mánin rísur, málningur eftir C. D. Friedrich, sæst í Galerie der Romantik í Berlin*